LM-099/2023

Løgtingsmál 63

Hoyringarskriv frá Kunoyar kommunu.

Viðmerkingar til lógaruppskotið *burðardygg ferðavinna.*

Vit fegnast um, at uppskot nú er komið um hetta nógv umstrídda mál.

Viðmerkingar til §1

- Óheppið at brúka orðið burðardygd, tí tað er trupult at fáa nakra ferðavinnu umhvørvisliga burðardygga. Tó kann grundgevast við peningarligari og sosialari burðardygd, tó skulu øll hesi trý verða javnt umboðað fyri at kunna kalla hetta fyri burðardygd
- Skulu vit tosa um burðardygd, so vantar tað í lógartekstinum at koma inn á, hvussu nógv ferðafólk skulu kunna koma til Føroya. Landið er sera lítið og tí er neyðugt at vit tora at tosa um, hvussu nógva ferðavinnu landið tolir, og kanska eisini seta eitt mark.

Viðmerkingar til §5

- Ógreitt hvat Standardavtalan er.

Viðmerkingar til §6

- At gera eina so umfatandi ferðavinnuætlan, við so stuttari freist, verður sera krevjandi hjá einari lítlari kommunu bæði figgjarliga og í arbeiðsorku.

Viðmerkingar til §8

- Stk 1. Her stendur at kommunan **skal** gera nýggjar farleiðir, nær eru nóg mikið at gøtum?
- Stk 3. Hvat inniber tað at halda bygdagøtur og hvørjar gøtur eru umfataðar?

Viðmerkingar til §14

- Har stendur, at partur verður latin til bygdina at umsita til trivnað og átøk á staðnum. Hetta er ógvuliga vítt, og kann tiskil brúkast til alt møguligt, sum gagnar borgarunum. Hetta kann gera kommununrnar bundnar av hesi inntøkuni, sum kemur frá umhvørvisgjaldinum. Kann vandi vera fyri, at kommununrnar vilja hava at meira og meira ferðafólk koma til landið, tí tær vilja hava meira pening?
- Hetta kann gerast umsitingarliga tungt hjá smáu kommununum. Og eisini dýrt at gera allar gøtur o.a.

Vinarliga

Poul Jacob Poulsen, Borgarstjóri